QUAD-LOCK®
Insulating Concrete Forms

# Verkætlanin samanumtikið

## Verkætlanarlýsing

**Staður :**
- Miðvágur

**Slag :**
- 5 bygningar, upp til 3 hæddir, barnagarðs-miðstøð

**Støðd :**
- 1800 fermetur

**Tilfar brúkt :**
- Quad-Lock bjálvistoypi-formar í ymiskum tjúkdum

**Verkætlanar felagar :**
- Eigari :
  www.vaga.fo
- Arkitektar :
  www.wt.fo
- Stoypifelag :
  www.dalsbo.info
- Sølufelag :
  www.kubbi.info

**www.quadlock.com**
**604.590.3111 or 888.711.5625**

## Barnagarður í Miðvági




**Uppgáva** :

ICF .... hvat er tað?

Veðurbardu norðatlantisku oyggjarnar er júst rætta umhvørvið, har ið Quad-Lock bjálvistoypiformar (Insulated Concrete Forms) veruliga koma til sín rætt.

So fyrireikingarnar vóru nógvar, tá tað gjørdist greitt at framskygnir menn, ið varaðu av hesi verkætlan, vístu framskygni at kanska fara at royna hetta, enn púrt ókenda tilfar, heima.

Prógvini um sera góðar royndir í m.a. USA, og síðani sjón fyri søgn í Írlandi gjørdu, at menn vóru jaligir.

Brandmyndugleikarnir vóru eisini jaligir, tá teir høvdu sett seg neyvt inn í málið.

Samanumtikið er ongin ivi í, at valda loysnin er tann rætta fyri tey, ið dagliga koma at búleikast í barnagarðinum.

**Loysn** :

Quad-Lock var vald til hesa verkætlan av ymiskum orsøkum. Sniðið á tí eina bygninginum er 6-hyrnt við m.a. 120 stiga vinklum, sum vísti seg at vera sera lætt at stilla og stoypa við Quad-Lock. Góð realbjálving var ynskilig. Rættur prísur er, sum altíð, umráðandi.

Mennirnir vóru glaðir fyri tilfarið frá fyrsta løtu - onkur nevndi at hetta var eins og at spæla Lego. Summir høvdu fingið ryggtrupulleikar av at baksast við gomlu stoypiformarnar, men tað er nú fortíð.

Tá barnagarðurin verður tikin í brúk, kann byggiharrin síggja fram til at aðrir fyrimunir, enn teir byggiteknisku, fara at merkjast. Væntast kann sostatt, at hitarokningin verður munandi lægri, enn um bygningarnir vóru úr 'vanligum' tilfari.

Nógv fólk hevur vitjað í Miðvági at forvitnast um byggjaríið, og flestøll duga at síggja fyrimunirnar og dygdina í Quad-Lock. Ásannast kann, at fleiri Quad-Lock byggiverkætlanir eru ávegis.





*Version 1.0 Release Date 2009-07 Copyright Quad-Lock Building Systems, Ltd.*